# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 09-02-23-35 | Lóg: Skattalógin § 25 | Avgerð tikin: 29.11.2010 |
|---|---|---|

## Hækking av skattskyldugu inntøkunum fyri 2006 og 2007. Lág eginnýtsla. Fríur bústaður, el og olja. Fríur bilur.


**Samandráttur:**

**TAKS hevur hækkað skattskyldugu inntøkuna hjá kærda fyri 2006 og 2007 grundað á lága eginnýtslu, virðið av fríum bústaði, el, olju og fríum bili. Kommunala Skattakærunevndin gav kærda viðhald í, at grundarlag ikki var fyri at hækka inntøkuna. TAKS hevur kært hesa avgerð.**
**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at broyta avgerðina hjá Kommunalu Skattakærunevndini og staðfesta avgerðina hjá TAKS um, at inntøkan hjá kærda skal hækkast við ávikavist 25.814 kr. og 25.867 kr. fyri 2006 og 2007, umframt við 60.000 kr. hvørt árið, tvs. 5.000 kr. um mdr., til privatar útreiðslur, at kærdi skal rinda skatt av fríum bústaði, fríari olju og fríum el: 82.511 kr. fyri 2006 og 90.522 kr. fyri 2007, og at kærdi skal skattast av virðinum av fríum bili, 41.900 kr. fyri 2006 og 42.750 kr. fyri 2007.**


### Avgerð

TAKS hevur hækkað skattskyldugu inntøkuna hjá kærda fyri 2006 og 2007 grundað á lága eginnýtslu, virðið av fríum bústaði, el, olju og fríum bili. Kommunala Skattakærunevndin hevur givið kærda viðhald í, at grundarlag ikki var fyri at hækka inntøkuna. TAKS hevur kært hesa avgerð.

**TAKS – bræv frá 16. mars 2009**
TAKS hevur upplýst kærda um, at TAKS hevur samanborið inntøkur hansara við ognina primo og ultimo og er komin fram til, at eginnýtslan/privatnýtslan er kr. -68.880 í 2005, kr. 10.186 í 2006 og kr. 10.133 í 2007.

TAKS førir fram, at ikki ber til at liva av minus-inntøku og heldur ikki er nógv í 2006 og 2007 at liva av, tá havast skal í huga, at hetta skal nøkta allar privatar útreiðslur so sum mat, klæðir, ferðing, telefon, sjúkrakassagjald, bil o.s.fr. – og talar hetta fyri, at talan óivað er um aðrar inntøkur/ogn/skuld, enn tað TAKS hevur upplýsingar um.

TAKS biður um frágreiðing um, hvussu kærdi hevur fíggjað liviútreiðslurnar í 2005, 2006 og 2007, og til útroknaðu privatforbrúkini fyri árini 2005-2007. Um aðrar inntøkur eru enn tær, sum TAKS hevur fingið upplýst, verður kærdi biðin um at viðleggja upplýsingar og skjalprógv fyri hesum.

**Kærdi – bræv frá 31. mars 2009**
Kærdi upplýsir, at hann onki arbeiði hevur havt í 2005-2007, men at hann hevur havt nakað av ogn ígjøgnum fleiri ár, og hevur selt burtur av, soleiðis at tey saman við fólkapensjónini hjá hjúnafelaganum so dánt kunnu klára seg.

**TAKS – ætlanarskriv frá 17. apríl 2009**
Ætlanarskrivið frá TAKS er soljóðandi:

”…..TAKS ætlar at broyta skattskyldugu inntøku tygara fyri 2005, 2006 og 2007 soleiðis:

2005:
Skattskyldug inntøka sambært verandi uppgerð 10.000 kr.

Mett inntøka orsakað lága eginnýtslu er skattskyldug inntøka,
Sí frágreiðing niðanfyri +164.880 kr.

Virðið av fríum bústaði, el og olju er skattskyldug inntøka,
Sí frágreiðing niðanfyri +83.158 kr.

Virðið av fríum bili er skattskyldug inntøka,
Sí frágreiðing niðanfyri +22.150 kr.

Broytt skattskyldug inntøka 290.263 kr.

2006:
Skattskyldug inntøka sambært verandi uppgerð 66.000 kr.

Mett inntøka orsakað lága eginnýtslu er skattskyldug inntøka,
Sí frágreiðing niðanfyri +85.814 kr.

Virðið av fríum bústaði, el og olju er skattskyldug inntøka,
Sí frágreiðing niðanfyri +82.511 kr.

Virðið av fríum bili er skattskyldug inntøka,
Sí frágreiðing niðanfyri +41.900 kr.

Broytt skattskyldug inntøka 276.225 kr.

2007:
Skattskyldug inntøka sambært verandi uppgerð 20.000 kr.

Mett inntøka orsakað lága eginnýtslu er skattskyldug inntøka,
Sí frágreiðing niðanfyri +85.867 kr.

Virðið av fríum bústaði, el og olju er skattskyldug inntøka,
Sí frágreiðing niðanfyri +90.522 kr.

Virðið av fríum bili er skattskyldug inntøka,
Sí frágreiðing niðanfyri +42.750 kr.

Broytt skattskyldug inntøka 239.139 kr.

Viðvíkjandi eginnýtslu/privatforbrúki:
TAKS hevur samanborið inntøkur tygara við ognina primo og ultimo og er komin fram til, at eginnýtslan er -68.880 kr. í 2005, 10.186 kr. í 2006 og 10.133 kr. í 2007.

Her er ikki hædd tikin fyri teimum 36.000 kr., tygum hava goldið Sp/f P fyri húsaleigu, og tískil er eginnýtslan fyri árini í veruleikanum 36.000 kr. minni pr. ár, tvs. -104.880 kr. í 2005, -25.814 kr. í 2006 og -25.867 kr. í 2007 (útrokningar eru hjálagdar).

Ikki ber til at liva av minus-inntøku, og tískil má vera talan um aðra inntøku enn hana, ið TAKS hevur upplýsingar um.

Sambært skrivi tygara, dagfest 31. mars 2009 hava tygum selt ogn gjøgnum árini, men einki skjalprógv er sent saman við.

Av tí at einki skjalprógv fyriliggur fyri hesari sølu av ognum og heldur ikki skjalprógv fyri sjálvum peningaflutninginum í hesum sambandi, kann ikki takast hædd fyri hesum í útrokningini av eginnýtsluni – nóg gott prógv fyri, at tygum veruliga hava móttikið pengar, er ikki til staðar.

Tvs. at gingið verður út frá, at onnur inntøka hevur verið í árunum 2005, 2006 og 2007, og av tí at einki skjalprógv fyriliggur fyri, hvaðani inntøka kemur frá, verður gingið út frá, at talan er um skattskylduga inntøku, tí sambært § 25 í skattalógini framgongur m.a., at alt er skattskyldugt, sum hin skattskyldugi í inntøkuárinum hevur lagt inn í peningi ella peningsvirði.

Skattskylduga inntøka tygara verður tí hækkað soleiðis, at eginnýtslan kemur uppá eitt rímiligt forbrúk fyri 2 persónar (tygum og hjúnafelagi tygara).

Hetta er mett til 5.000 kr. pr mánað, og skal hetta dekka allar privatar útreiðslur, uttan húsaleigu, el, olju og rakstrarútreiðslur til bil, tí hetta er mett at vera útreiðslur, ið eru dekkaðar av felagnum, har tygum eru høvuðspartaeigari, sí frágreiðing seinni í hesum skrivi.

Tvs. umframt at eginnýtslan verður hækkað upp til 0 kr., so er 12x5.000 kr. = 60.000 kr. lagt aftrat pr. ár, og verður skattskylduga inntøkan tískil hækkað soleiðis fyri árini:

2005: 104.880 kr. + 60.000 kr. = 164.880 kr.
2006: 25.814 kr. + 60.000 kr. = 85.814 kr.
2007: 25.867 kr. + 60.000 kr. = 85.867 kr.

Viðvíkjandi fríum bústaði, el og olju:
Sambært fyriliggjandi upplýsingum búgva tygum í húsum hjá Sp/f P, har tygum eru høvuðspartaeigari.

Hvør hæddin í húsinum er 22,19 alin, umroknað til 13,86mx11,97m = 165,9 fermetrar, og húsast tygum á einari hædd. Í húsaleigu rinda tygum 3.000 kr. pr. mánað, og er hetta við bæði el og olju.

TAKS metir ikki, at ein húsaleiga uppá 3.000 kr. pr. mánað við el og olju svarar til marknaðarleiguna fyri eini hús av slíkum slagi og stødd.

T.d. eru rakstrarútreiðslurnar av húsinum nógv størri enn tann innkomna húsaleigan (í 2006 eru útreiðslur til olju, el og trygging 54.281 kr. + útreiðslur til viðlíkahald v.m. uppá 8.160 kr.). Húsið verður útleigað við halli á hvørjum ári, og sæst eingin forrenting vera í íløguni av hesum húsakeypi hjá felagnum – men verður felagið noytt til at seta pening til á hvørjum ári.

Sum høvuðspartaeigari í felagnum Sp/f P hava tygum avgerandi ávirkan á, hvussu felagið verður rikið, hvørjar avtalur felagið ger o.l., og er tí ikki talan um avtalu av húsaleigu millum tveir óheftar partar.

Út frá frammanfyri nevndu viðurskiftum metir TAKS sostatt ikki, at húsaleigan svarar til marknaðarleiguna.

Tískil er mett, at tygum hava frían bústað, fría olju og frítt el í árunum 2005, 2006 og 2007, og er hetta skattskyldug inntøka

Tær 3.000 kr, tygum hava goldið í húsaleigu pr. mánað, verða síðani roknaðar sum egið gjald, og verður hetta mótroknað í virðinum av fríu ágóðunum.

Vísast kann til § 25, nr. 4 í skattalógini og VLS-2004 D.1. (avrit er hjálagt)

Skattskylduga inntøka tygara verður tískil hækkað við fríum ágóðum soleiðis:

2005:

| | | |
|---|---|---|
| Fríur bústaður | 165,9 m² x 576 kr. | = 95.558 kr. |
| Frítt el | | = 7.900 kr. |
| Frí olja | | = 15.700 kr. |
| Egið gjald | | -36.000 kr. |
| At skatta av | | 83.158 kr. |

2006:

| | | |
|---|---|---|
| Fríur bústaður | 165,9 m² x 551 kr. | = 91.411 kr. |
| Frítt el | | = 7.800 kr. |
| Frí olja | | = 19.300 kr. |
| Egið gjald | | -36.000 kr. |
| At skatta av | | 82.511 kr. |

2007:

| | | |
|---|---|---|
| Fríur bústaður | 165,9 m² x 580 kr. | = 96.222 kr. |
| Frítt el | | = 7.800 kr. |
| Frí olja | | = 22.500 kr. |
| Egið gjald | | -36.000 kr. |
| At skatta av | | 90.522 kr. |

Virðið á fríum ágóðum verður á hvørjum ári ásett af Toll- og skattaráðnum.

Viðvíkjandi fríum bili:
Sambært fyriliggjandi upplýsingum eigur felagið Sp/f P, har tygum eru høvðuspartaeigari, ein vøruvogn. Felagið heldur til á somu adressu, har tygum búgva, og stendur hesin bilur á bústaði tygara, tá hann ikki er í brúk.

Sum høvuðspartaeigari í Sp/f P hava tygum avgerandi ávirkan á, hvussu bilurin verður nýttur, og tí verða størri krøv sett, um tygum ikki skulu skattast av fríum bili. Tvs. prógvast skal ella á annan hátt sannast, at bilurin ikki hevur verið nýttur til privata koyring, eitt nú við koyribók ella líknandi.

Sambært útrokning av eginnýtslu tygara frammanfyri í hesum skrivi framgongur, at ikki hava tygum nógvan pening tøkan at rinda rakstrarútreiðslur av øðrum privatum bili í árunum 2005, 2006 og 2007, og er tí mest sannlíkt, at tygum hava brúkt bil felagsins til privata koyring í hesum árum – og einki er, ið bendir á, at so er ikki.

Sambært roknskapum felagsins eru bilútreiðslurnar 18.080 kr. í 2005, 44.757 kr. í 2006 og 43.549 kr. í 2007, og einastu inntøkur felagsins eru 36.000 kr. pr. ár í húsaleiguinntøku – tvs. vinnuliga koyringin av hesum bili sæst ikki forsvara bilútreiðslur av slíkari stødd.

Tískil er mett, at tygum hava frían bil í árunum 2005, 2006 og 2007, og er hetta skattskyldug inntøka (vísast kann til § 25, nr. 4 í skattalógini og VLS-2004 D.1., avrit eru hjáløgd hesum skrivi).

Tygum verða tískil skattað av virði av fríum bili/vøruvogni (bólkað undir ”allir aðrir bilar”, eginvekt 1750 kilo) soleiðis:

2005: 22.150 kr.
2006: 41.900 kr.
2007: 42.750 kr.

Virðið á fríum ágóðum verður á hvørjum ári ásett av Toll- og skattaráðnum… … …”

**Kærdi – viðmerkingar til ætlanarskrivið**
Viðvíkjandi mettari inntøku orsakað av lágari eginnýtslu viðmerkir kærdi, at tey liva á bygd og hava óivað eitt forbrúk so lágt, at tað kann tykjast ørkymlandi fyri fólk í høvuðsstaðnum. Tað skal sláast fast, at kærdi ikki hevur havt nakra aðra skattskylduga inntøku enn hana, kærdi hevur uppgivið á sjálvuppgávu sínari. Av øðrum skattafríum inntøkum kann nevnast, at tey seinnu árini hava selt partabrøv, selt húsini til Sp/f P, og tey hava eisini selt eini summarhús uttanlanda.

Kærdi er sera skelkaður av, at TAKS beinleiðis ákærir hann fyri at hava aðra inntøku, sum hann við vilja ikki skal hava givið upp til skattamyndugleikarnar. Hetta er ein sera grov ákæra, og vil hann tí biðja TAKS um at prógva sítt uppáhald.

Viðvíkjandi fríum bústaði, el og olju viðmerkir kærdi, at hann og hjúnafelagin hava eina leiguavtalu við Sp/f P á kr. 3.000 um mánaðin, íroknað el og hita. Íroknað leiguna er ikki viðlíkahald av húsunum, tí hetta skulu tey sjálvi gera. Húsini, tey búgva í, eru skjótt 50 ára gomul og liggja sum kunnugt á bygd. Leiguprísurin er ásettur við støði í hesum, og tað er teirra fatan, at tað er trupult at leiga eini gomul illa bjálvaði hús fyri meira enn hetta á bygd.

Tí meta tey ikki, tað er rætt, at tey skulu skattast av fríum bústaði, tí tey sum omanfyri greitt frá, longu gjalda leigu.

Viðvíkjandi fríum bili, 2005-2007 viðmerkir hann, at tað er rætt, at Sp/f P eigur ein gamlan vørubil. Hesin bilur verður brúktur til virksemið hjá felagnum. Bilurin stendur uttan fyri hølini hjá Sp/f P, tá hann ikki verður brúktur. Sjálvur hevur hann koyrikort; men hevur ikki koyrt bil seinastu 15 árini. Kærdi býr og livir á bygd og hevur ikki tørv á at hava bil. Tí er tað púra burturvið, at hann skal skattast av virði av fríum bili.

**TAKS – avgerð frá 1. september 2009**
Sambært avgerðini hjá TAKS verður skattskylduga inntøkan fyri 2005 ikki hækkað, tí sambært lóg um toll- og skattafyrisiting er árið 2005 fyrnað.

Upplýst verður eisini, at broytingin fyri árini 2006 og 2007 er tann sama sum uppsett í ætlanarskrivinum. TAKS kann ikki ganga sjónarmiðum kærarans á møti og heldur fast við grundgevingina í ætlanarskrivinum soleiðis, at inntøkan verður hækkað vegna lága eginnýstlu, frían bústað, el og olju og frían bil.

Viðvíkjandi eginnýtsluni viðmerkir TAKS eisini, at einki skjalprógv er sent viðvíkjandi sølu av ogn gjøgnum árini.

Av tí at einki skjalprógv fyriliggur fyri hesari sølu av ognum og heldur ikki skjalprógv fyri sjálvum peningaflutninginum í hesum sambandi, kann ikki takast hædd fyri hesum í útrokningini av eginnýtsluni – nóg gott prógv fyri, at kærdi veruliga hevur móttikið pengar, er ikki til staðar.

**Kommunala Skattakærunevndin**
Skattakærunevndin er komin fram til ta niðurstøðu at geva kærda viðhald í, at TAKS ikki kann hækka skattskyldugu inntøkuna orsakað av ov lágari eginnýtslu, tí kærdi vísir á, at hann hevur havt aðra inntøku í tíðarskeiðnum.

Viðvíkjandi fríum bústaði gav nevndin kærda viðhald í, at niðara hæddin bert hevur verið nýtt til vinnuligt endamál, og at kærdi sostatt ikki skal skattast av hesum fermetrum.

Viðvíkjandi fríum bili gav nevndin kærda viðhald í, at hann ikki nýtir bilin og kann sostatt heldur ikki skattast av hesum brúki.

**Avgerð hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
*Hækking av inntøku orsakað lága eginnýtslu*
Sambært útrokningum hjá TAKS av eginnýtsluni, hevur eginnýtslan fyri árini 2006 og 2007 verið negativ við ávikavist -25.814 kr. og -25.867 kr. Viðvíkjandi lógargrundarlagnum fyri uppgerðini kann vísast til kunngerð nr. 98 frá 14. desember 1987 um uppgerð av skattligu eginnýtsluni og rundskriv nr. 10 frá 19. januar 1988.

Hetta merkir, at peningur, sum ikki framgongur sum inntøka av sjálvuppgávuni, í ein ella annan mun fíggjar nýtsluni hjá kærda og hjúnafelaga hansara.

Til hetta hevur kærdi viðmerkt, at hann hevur selt ogn gjøgnum árini, sum hevur fíggjað eginnýtsluna. Selt eru m.a. partabrøv, húsini eru seld til Sp/f P, og summarhús uttanlanda eru seld.

Hetta er tó ikki skjalprógvað og kann tí ikki góðtakast sum frágreiðing um fígging av eginnýtsluni.

Inntøkan hjá kærda skal tí hækkast við ávikavist -25.814 kr. og -25.867 kr. fyri 2006 og 2007, umframt við 60.000 kr. hvørt árið, tvs. 5.000 kr. um mdr., til privatar útreiðslur, so sum mat og klæðir.

Viðvíkjandi hækkingini við teimum 5.000 kr. um mdr. førir kærdi fram, at hetta er ov høgt mett. Generelt sæð kann hetta ikki metast at vera høgt mett, tá hendan upphædd skal dekka privatar útreiðslur til tvey vaksin, herundir mat, klæðir, frisør, tannlæknarokningar, gávur o.a. Hinvegin kann tað ikki avvísast, at eginnýtslan ítøkiliga kann vera lægri enn 5.000 kr., men kærdi hevur ikki skjalprógvað ella á annan hátt víst á, at privatu útreiðslur hansara eru lægri enn 5.000 kr.

**Grundað á omanfyri standandi hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørt at broyta avgerðina hjá Kommunalu Skattakærunevndini og staðfesta avgerðina hjá TAKS um, at inntøkan hjá kærda skal hækkast við ávikavist 25.814 kr. og 25.867 kr. fyri 2006 og 2007, umframt við 60.000 kr. hvørt árið, tvs. 5.000 kr. um mdr., til privatar útreiðslur.**

*Hækking av inntøku orsakað av fríum bústaði, el og olju*
Sambært upplýsingunum í málinum leigar kærdi eina hædd á 165,9 fermetrar í húsum, sum Sp/f P eigur. Kærdi er høvuðspartaeigari í felagnum.

Húsaleigan er 3.000 kr. um mánaðin við el og olju.

Húsaleigan er heldur lág og við atliti til, at kærdi er høvuðspartaeigari í Sp/f P, sum eigur húsini, og talan tí ikki er um avtalu av húsaleigu millum tveir óheftar partar, kann húsaleigan ikki metast at samsvara við marknaðarleiguna.

Kærdi hevur tí í ein mun frían bústað, fría olju og frítt el í 2006 og 2007, og er hetta skattskyldug inntøka vísandi til § 25, nr. 4 í skattalógini.

Virðið á fríum ágóðum verður á hvørjum ári ásett av Toll- og skattaráðnum.

Sambært hesum ásetingum skal kærdi rinda skatt av:

2006:

| | | |
|---|---|---|
| Fríur bústaður | 165,9 m² x 551 kr. | = 91.411 kr. |
| Frítt el | | = 7.800 kr. |
| Frí olja | | = 19.300 kr. |
| Egið gjald | | -36.000 kr. |
| At skatta av | | 82.511 kr. |

2007:

| | | |
|---|---|---|
| Fríur bústaður | 165,9 m² x 580 kr. | = 96.222 kr. |
| Frítt el | | = 7.800 kr. |
| Frí olja | | = 22.500 kr. |
| Egið gjald | | -36.000 kr. |
| At skatta av | | 90.522 kr. |

**Grundað á omanfyri standandi hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørt at broyta avgerðina hjá Kommunalu Skattakærunevndini og staðfesta avgerðina hjá TAKS um, at kærdi skal rinda skatt av fríum bústaði, fríari olju og fríum el: 82.511 kr. fyri 2006 og 90.522 kr. fyri 2007**

*Hækking av inntøku orsakað av fríum bili*
Sambært fyriliggjandi upplýsingum eigur felagið Sp/f P ein vøruvogn. Felagið heldur til á somu adressu, har kærdi býr, og stendur hesin bilur á bústaði kærda.

Bilurin er ein vøruvognur, og er egnaður til privatbrúk. Kærdi er høvuðspartaeigari í Sp/f P, sum eigur vøruvognin, og vøruvognurin stendur uttanfyri bústað hansara. Hann má tí metast at hava fullan ræðisrætt á bilinum. Grunsul er tá fyri, at vøruvognurin eisini verður brúktur privat.

Í slíkum førum verður tað upp til kærda at lyfta próvbyrðuna fyri, at vøruvognurin ikki verður brúktur privat.

Tá kærdi ikki hevði annan bil tøkan til privata nýtslu, er próvbyrðan fyri, at vøruvognurin ikki verður brúktur privat, sera torfør at lyfta.

Kærdi hevur ikki víst á umstøður, sum kunnu metast at prógva ella gera sannlíkt, at vøruvognurin ikki verður nýttur privat, og próvbyrðan er tí ikki lyft.

Kærdi skal tí skattast av virðinum av fríum bili vísandi til § 25, nr. 4 í skattalógini.

Virðið av fríum ágóðum verður á hvørjum ári ásett av Toll- og skattaráðunum.

Sambært hesum ásetingum skal kærdi rinda skatt av: (bólkað undir ”allir aðrir bilar”, eginvekt 1750 kilo)

2006: 41.900 kr.
2007: 42.750 kr.

**Grundað á omanfyri standandi hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørt at broyta avgerðina hjá Kommunalu Skattakærunevndini og staðfesta avgerðina hjá TAKS um, at kærdi skal skattast av virðinum av fríum bili, 41.900 kr. fyri 2006 og 42.750 kr. fyri 2007.**